*Dagf. 7. mai 2020*
*HMR J. nr. 20/00423-4*

***Kaj Leo Holm Johannesen***
***landsstýrismaður***

***Svar***

***upp á***

**fyrispurning nr. 76/2019 eftir § 52a í tingskipanini um at lata samfelagið upp á tryggum grundarlagið frá Kristinu Háfoss, løgtingskvinnu**

**Spurningurin var soljóðandi:**

1. Hví hava føroyskir myndugleikar ikki sett sum mál at fáa so nógv fólk í Føroyum sum møguligt kannað fyri COVID-19 koronavirus?
2. Tá vit kunnu kanna 600 um dagin - og um vit gagnnýttu okkara kanningarútgerð í Føroyum til fulnar - hvussu skjótt høvdu vit kunnað kannað øll fólk í Føroyum?
3. Heldur landsstýrismaðurin, at tað hevði styrkt møguleikan at tálma COVID-19 koronavirusinum, um allir føroyingar fingu bjóðað at verða kannað fyri COVID-19? Um ja, hví verður hetta ikki framt?
4. Metir landsstýrismaðurin, at tað hevði styrkt møguleikan fyri gransking og nýggjari vitan í Føroyum um COVID-19 koronavirusið, um vit fingu kannað so stóran part av fólkinum í Føroyum sum møguligt? Um ja, hví verður hetta ikki framt?
5. Ætlar landsstýrið at tryggja við lóg, at øll, ið koma til Føroyar úr útlondum, skulu í 14 dagar sóttarhald, og/ella at tey skulu COVID-19 kannast, t.d. tá tey koma til landið, eftir 1 viku og eftir 2 vikur? Um ikki, hví?
6. Um vit hava møguleikan at fremja fleiri kanningar og ikki brúka hesar umstøður, ætlar landsstýrismaðurin at bjóða øðrum grannatjóðum at senda kanningar til Føroya at verða greinaðar?

**Svar:**

**Til spurning 1**
Føroysku heilsumyndugleikarnir hava frá byrjan valt eina tilgongd, sum tekur støði í at kanna øll, har minsti illgruni er um COVID-19, eisini tey, sum hava mild sjúkueyðkenni, og síðani eftirfylgjandi at tryggja eina effektiva smittuuppsporan og avbyrging av positivt testaðum og møguliga smittaðum. Hendan tilgongdin hevur higartil virkað sera væl.

Avgerðin um at raðfesta COVID-19 kanningarnar til tey, sum vísa sjúkueyðkenni, heldur enn ókritiskt at kanna øll, er tikin við tveimum atlitum:

- Longu áðrenn farsóttin byrjaði í Føroyum, gjørdust mestsum allar veitingar av tilfari uttaneftir óvissar – bæði tá talan var um verndarútgerð og tilfar til kanningar fyri COVID-19.
- Metingin var, og er framvegis, at sannlíkindini fyri at finna smittaði við at kanna fólk við ongum sjúkueyðkennum, er sera lítil.

**Til spurning 2 og 3**
Kanningin fyri COVID-19 staðfestir bert, um viðkomandi kanningardagin hevur so stóra mongd av virus í sær, at tað kann síggjast á testini. Ein, ið er kannaður negativur, kann væl gerast positivur dagin eftir, um viðkomandi hevði byrjandi smittu í sær kanningardagin. Sostatt er ein negativ viruskanning ikki nøkur trygd fyri, at viðkomandi ikki kann vera smittaður.

Sjálvt um heilsuverkið gagnnýttu alla kanningarorkuna til breitt at kanna fólk, sum ikki hava sjúkueyðkenni, hevði tað tikið út við tríggjar mánaðir at kannað øll fólk í Føroyum einaferð.

**Til spurning 4**
Einstakar granskingarverkætlanir eru longu settar í verk fyri at royna at fáa lýst talið av ókendum smittaðum - sokallaðu "myrkatølini" í Føroyum. Úrslitini higartil geva ikki ábendingar um, at tað í núverandi støðu er stórvegis nyttuvirði granskingarliga í at kanna øll fólk í Føroyum. Hinvegin eru nógvir aðrir áhugaverdir granskingarmøguleikar í samband við COVID-19 innan eitt nú epidemiologi, infektiónsmedisin og ílegur í Føroyum.

**Til spurning 5**
Í verandi støðu hevur landsstýrið valt eina skipan, sum byggir á álit og ábyrgd hjá einstaka borgaranum heldur enn tvingsil. Tað verður framvegis staðiliga mælt til, at ferðandi til Føroya fara í heimauppihald í 14 dagar. Samstundis eru mannagongdirnar broyttar í sambandi við heimauppihaldið, har eitt sóttarhaldstoymi tvær ferðir setir seg í samband við tann, sum er komin til landið – og har persónurin eisini fær ein kontaktpersón í toyminum, meðan hann er í heimauppihaldi.

Landsstýrið hevur havt ætlan um at seta eina skipan í verk, har fólk verða kannað fyri COVID-19, tá ið tey koma til landið. Heilsufakliga hevur tað verið frámælt at gera tílíkar kanningar, tí tær, sum áður nevnt, geva eina falska trygd og eina løtumynd. Er kanningarúrslitið negativt, kann ikki útihýsast, at viðkomandi er smittaður kortini, samstundis sum tann negativa kanningin kann hava tað við sær, at viðkomandi ikki tekur tilmælini um sóttarhald í nóg stórum álvara. Tí verður mett tryggast at halda fast í tilmælinum um, at øll fara í heimauppihald í 14 dagar. Landsstýrið hevur higartil valt at fylgja heilsufakligu ráðgevingini í hesum spurningi.

Um tað gerst neyðugt, er landsstýrið sinnað til at útvega sær heimild til at seta reglur um tvungið heimauppihald í verk.

**Til spurning 6**
Sum tað hevur verið alment frammi, er ein fyrispurningur komin til Heilsufrøðiliga Starvsstovuna um hjálp til COVID-19 kanningar í Hebridinum. Starvsstovan hevur alment boðað frá, at hon er opin fyri at hjálpa skotsku oyggjunum, men sambært starvsstovuni verður tað væntandi ikki við at greina kanningar hjá teimum í Føroyum, tí hetta verður ikki mett sum ein skilagóð og nøktandi loysn, men í staðin við at hjálpa teimum við at seta upp ein kanningarhátt hjá teimum sjálvum.

Sum skilst kemur tað eisini at ganga ov long tíð til, at eitt kanningarúrslit er klárt, um grannatjóðir senda kanningar til Føroya at verða greinaðar, og tí verður tað ikki mett sum ein nøktandi loysn. Tískil tykist tað ikki at geva nakra meining at tosa um at veita avlopskanningar til grannalondini. Talan er eisini í síni heild um eina sera lítla nøgd, samanborið við tørvin og kanningartølini í grannlondunum.

Heilsumálaráðið, 7. mai 2020

**Kaj Leo Johannesen**

landsstýrismaður